# Seyma toy uttan á bók



NÁM TJ2019 Skeið í handarbeiði Tóra Joensen og Sára Mrdalo

**Gott at duga, áðrenn tú fert í gongd:**

-at hava seymikoyrikort

**Tilfarslisti:**

Toy við eitt sindur av elastikki í

Trillutráð

Knappanálir

Seyminál

Notatbók við harðari permu umleið 21 cm x 15 cm

Okkurt at prýða permuna við

Kløn elastikk í trimum litum

1 knappur

Tunt bummulstógv í trimum ymiskum litum

Mannagongd:

1.

Klipp 1 stykki toy á 24 cm x 33 cm

Klipp 2 stykkir toy á 24 cm x 13 cm



2. Sikk-sakka runt um øll stykkini

3. Klipp tað broderaða toyið  umleið 5,5 cm x 9 cm, ella eftir ynski. Boygg tað stóra stykkið í helvt og nála broderíið niður á toyið, har tú ynskir, at tað skal vera. Hugsa um, at tað minkar, tá seymurin fer av.



4. Sikk-sakka tað niður á toyið.



5. Legg smáu stykkini oman á stóra stykkið, rætt í móti rættu. Nála stykkini saman soleiðis: Nálirnar venda út og inn, tann spíski endin vendir út móti kantinum.



6. Seyma fram við kantinum har nálirnar eru, umleið 1 cm inni á toynum.

Vend stykkinum á og legg uttan á bókina:



7. Klipp 15 cm av elastikki í trimum ymiskum litum. Legg elastikkini saman og bint knút á endan. Flætta endarnar og bint knút á (hin) endan.

 Mynd tikin av netinum.

Boyggj elastikkið í helvt og seyma elastikki fast mitt á baksíðuna, soleiðis at báðir knútarnir eru á baksíðuni:



8. Seyma kanppin á permuna áraka elastikkinum.



9. Klipp umleið 5 x 1 m av tógvi í trimum ymiskum litum. Legg tógvendarnar í helvt, so at tú hevur 5 lykkjur. Samla lykkjurnar og bint knút á endan (hin endan). Nú skal onkur halda endanum, har knúturin er, meðan annar bregdar bandið.



Enda við, at tú tekur ein lit og snarar hann um endan. Klipp endarnar javnt umleið 2-3 cm.

10. Seyma tað bregdaða bandið fast ovast á ryggin á bókini.

